# Fiskaðu eina kúgv

**UPPLIVING** Teir tríggir Pætur Árnason Jakobsen, Ingibjørn Johannesen og Frank Joensen, sum allir eru útisetar í Keypmannahavn, men eru heima í summarferiu, fingu í síðstu viku eina uppliving av teimum heilt serstøku: Teir fiskaðu eina kúgv!

Óli Jákup Jacobsen

– Eftir at hava verið til arbeiðis allan dagin hugsaðu vit, at tað hevði verið stuttligt at farið ein lítlan stimitúr norð til Enniberg, tí veðrið var so avbera gott. Familjan hjá Frank eigur ein lítlan bát norðuri í Hvannasundi, og vit fóru so ein túr, sigur Ingibjørn Johannesen.

– Vit sigldu nakað norður um og nutu ta stórslignu føroysku náttúruna: Fjøllini, havið, luftina og alt annað. Knappliga sum vit liggja nakað norðanfyri Viðareiði síggja vit eina flekkuta boyu liggja og flóta nakað frá. Sum vit nærkaðust henni, sóu vit at talan als ikki var um eina boyu, men um eina flótandi kúgv, sigur Pætur og flennir.

– Ja, hatta var so ótrúliga løgið, at vit kundu ikki annað enn at bresta útúr at flenna. Ein flótandi kúgv! Vit hava ikki flent so nógv í langa tíð, og mundu vit ikki fingið afturhald, sigur Frank.

Og víðari greiðir Frank frá:

– Vit samráddust eina løtu um, hvat vit skuldu gera við kúnna. Tá vit so sóu fólk á lendingini á Viðareiði, og vit bert lógu eini 500 metrar uttanfyri, so avgjørdu vit at sleipa kúnna inn á lendingina, so at tann rætti rætti ánarin av kúnni kundi avgera, hvat skuldi gerast við hana.

– Vit høvdu ein enda, sum vit bundu um hornini á kúnni, og soleiðis sleipaðu vit hana til lands. Hon var ótrúliga tung, so báturin sigldi ikki serliga skjótt. Eg kann bara ímynda mær, hvussu stuttligt tað hevur sæð út, at ein lítil stuttleikabátur kemur sleipandi við eini fullvaksnari kúgv í sjónum, sigur Ingibjørn flennandi.

### Hjálp til at slakta

– Komnir til Viðareiðis fingu vit ein bónda at kanna, um hann kendist við kúnna. Tað gjørdi hann ikki, tí hon var ómerkt. So tað lá til okkum at avgera, hvat vit skuldu gera við hana. Tað høvdu vit sjálvsagt onga hóming av, men vit ringdu til nakrar lokalar vinmenn, sum beinanvegin komu oman á lendingina at hjálpa okkum. Teir hildu sjálvsagt eisini, at støðan var ógvuliga skemtilig, sigur Pætur.

– Kúgvin varð slaktað við dráttin á lendingini á Viðareiði, og aftaná at verða skorin sundur í fjórðingar endaði hon í einum kølirúmi í Hvannasundi, sigur Frank.

Um kjøtið er etandi vita teir tríggir øðrvísi fiskimenninir ikki enn, men allir vóru samdir um at kjøtið sá frískt út. Tað rann nakað av blóði frá, tá hon varð skorin á háls, so hon hevur neyvan ligið í sjónum longri enn eitt samdøgur.



**ÓVÆNTAÐ**

*Stimitúrurin endaði øðrvísi, enn nakar hevði roknað við*
*Myndir Ingibjørn Johannesen*

Tað sást á henni, at hon var omandottin, tá hon bleiv slaktað, tí hon hevði nøkur sár á síðuni.

– Vit hava roynt at funnið fram til ánaran av kúnni, men tað hevur ikki eydnast enn, siga teir tríggir og leggja afturat, at hon bleiv slaktað undir so góðum umstøðum sum gjørligt.

Hon skal hanga uppi í einum kølirúmi í einar tvær vikur, áðrenn kjøtið kann roynast. Umframt hesa serstøku uppliving, so eru teir tríggir útisetarnir eisini vorðnir nøkur kilo av kjøti ríkari.



**KÚGV**

*Nei, tað var ikki ein boya – tað var ein kúgv*




**SLAKT**

*Kúgvin varð slaktað við dráttin á lendingini á Viðareiði*


## Góðir brúktir bilar

**Citroen Xsara 1.6 St. Car**
Árg: 02.07.01
Km: Litur: ljósa bláur
Kr. 45.000

**Mazda 6 2.0**
Árg: 02.12.03 4 hurðar
Km: 96.000 Litur: beige
Kr. 135.000

**Nissan Patrol 2.8 DTi Van**
Árg: 06.03.98
Km: 200.000 Litur: grønur
Kr. 87.000

**Opel Vectra 2.0D**
Árg: 20.01.99 4 hurðar
Km: 227.000 Litur: brúnur
Kr. 28.000

**Opel Zafira Comfort 2.0 DTI**
Árg: 25.06.04
Km: 90.000 Litur: silvurgráur
Kr. 147.000

**Nissan Patrol 3.0di Van**
Árg: 18.12.00
Km: 126.000 Litur: svartur
Kr. 115.000

**Opel Zafira 2.0 DTi Elegance**
Árg: 07.03.02 4 hurðar
Km: 125.000 Litur: Prest. Blue
Kr. 115.000

**Ford Mondeo Ghia V6**
Árg: 12.08.03 4 hurðar
Km: 75.000 Litur: svartur
Kr. 112.000

**Saab 9-3 2.0t 150hk**
Árg: 24.04.02 5 hurðar
Km: 123.000 Litur: Midnight blue
Kr. 78.000

**Toyota Camry 2.4i aut.**
Árg: 14.11.01 4 hurðar
Km: 180.000 Litur: vínreyður
Kr. 95.000

**Opel Astra 2.0 DTI Comfort**
Árg: 08.05.01
Km: 193.000
Kr. 42.000

**Peugeot 307 XS 2.0**
Árg: 12.02.04 5 hurðar
Km: - Litur: svartur
Kr. 89.000

**Opel Vectra El II 2.2**
Árg: 09.07.07 4 hurðar
Km: 69.192 Litur: silver
Kr. 190.000

**Ford Mondeo 2.0 TDI**
Árg: 28.08.01
Km: 173.000 Litur: blágráur
Kr. 75.000

**Peageot 306 1.6 St. Car**
Árg: 13.02.02
Km: - Litur: gráur
Kr. 39.000

**Opel Astra 1.6 Limited**
Árg: 19.12.03 5 hurðar
Km: 95.000 Litur: gráur
Kr. 82.000

**Peugeot 306 stc.**
Árg: 13.02.02
Km: - Litur: gráur
Kr. 39.000

**Skoda Octavia 1.6 FSi Ambi.**
Árg: 16.11.07
Km: 42.000 Litur: grønur
Kr. 173.000

**Volvo V50 1.8i**
Árg: 06.01.06
Km: 85.000 Litur: silvur
Kr. 187.000

**Rover 45 1.8**
Árg: 20.06.01
Km: - Litur: gráur
Kr. 25.000

**Rover 75 1.8i**
Árg: 07.12.01 4 hurðar
Km: 164.000 Litur: -
Kr. 54.000

**Ford Focus stc. 1.8 TD**
Árg: 08.06.07 5 hurðar
Km: 79.000 Litur: svartur
Kr. 189.000

**Peugeot 307 1.6**
Árg: 13.07.06
Km: 39.000 Litur: bláur
Kr. 146.000

**Nissan Almera 1.5 Comfort**
Árg: 07.05.02
Km: 111.000 Litur: Techno Grey
Kr. 64.000

**Peugeot 206 XR 1.4**
Árg: 31.01.01
Km: 115.000 Litur: reyður
Kr. 45.000

**Citroen Berlingo HDi**
Árg: 16.03.07 5 hurðar
Km: 113.000 Litur: brúnur
Kr. 142.000

**Daewoo Leganza aut.**
Árg: 11.08.98
Km: 60.000 Litur: svartur
Kr. 47.000

**Suzuki Grand Vitara**
Árg: 04.11.09
Km: - Litur: gráur
Kr. 227.000

undir Krákugjógv 19 · Tórshavn · tel 34 54 00 · fax 34 54 01
Auto Service
www.autoservice.fo


Sosialurin
www.sosialurin.fo